## DAGSINS MEINING

# Gevist við klandrinum!

Illa ber til at siga annað enn, at úttalilsini hjá Anders Fogh Rasmussen um, at Føroyar og Grønland skulu hava økt sjálvstýri á uttanríkispolitiska økinum, eru sera áhugaverd. Danski statsministarin hevur sum skilt tó ikki givið nøkur lyfti um verju- og trygdarpolitikk, og er tað kanska ikki betur enn næstbest. Tó er umráðandi hjá føroyskum politikarum at gevast við smáligum grenji og briksli og ístaðin vísa seg sum statsmenn og smíða, meðan jarnið er heitt og syrgja fyri, at nakað hendir í hesum málinum. Vit føroyingar hava nógv áhugamál at røkja uttanríkispolitiskt viðvíkjandi handli, fiskiveiðu, hvalaspurningum o.s.fr. Hetta eru alt mál, ið eru sera viðkomandi í dagligdegnum hjá føroyingum. Tað sigur ikki so lítið, tá tjóðveldismenn stara seg blindar uppá hernaðarmál og verjupolitikk, tá uttanríkismál skulu viðgerast.

Formaðurin í Løgtingsins Uttanlandsnevnd eigur at duga at viðgera mál konstruktivt og ikki fella í grøvina, har alt verður til klandursmál. Biður man um kunning og fær í minna lagi, so takkar man og sigur, at man væntar sær meir. Smádreingjalótir sum at siga, at um vit ikki fáa alt beinanvegin, so skulu vit einki hava, hoyra ikki heima uttanfyri kommunalar bøgarðar. Diplomati er ein kunstur, ið núverandi formaður í Uttanlandsnevndini eftir okkara tykki ikki meistrar. Man kann koma við sakligum eftirmetingum, men tað ræður um at halda høvdið kalt, meðan mál eru til viðgerðar, so at man ikki druknar alt í klandursretorikki beinanvegin.

Uttanlandsnevndin eigur at taka statsministaran uppá orðið beinanvegin uttan at neyðugt er at grenja um alt í senn. Hernaðarmál og verjupolitikkur skulu sjálvandi eisini takast upp, hóast slíkt neyvan eigur at standa ovast á breddanum hjá einari friðartjóð sum Føroyum, men ikki mugu handilslig áhugamál hjá føroyingum úti í heimi liggja og bíða eftir hesum. Farið á fund beinanvegin við danir og gevið føroyingum viðkað sjálvstýri á uttanríkispolitiska økinum, soleiðis sum statsministarin leggir upp til. Setið skjøtil á.

Bara tað, at statsministarin leggir upp til slíkt, ger so dyggiliga undirbrotliga tjóðveldisretorikkin, um at einki ber til uttan fullveldi, til skammar. Hetta hava vit so eisini merkt á so nógvum øðrum økjum. Vit eiga at halda høvdið høgt og gera tær broytingar vit sum føroyingar vilja hava og ikki avmarka okkum í undarligum teorium frammanundan. Føroysk áhugamál uttanlands eiga at verða umsitin av føroyingum. Spennandi verður um føroyingar – og serliga samgongan – fer at megna at fylgja fólkaviljanum um økt sjálvstýri, uttan at drukna málið í fiktivum avmarkingum av øllum møguligum slag, bert fyri at burturforklára, at slíkt ber til uttan fullveldi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sandoy gongur ljósari tíð í møti

**Gerhard Lognberg**
*løgtingsmaður*



Jú, nú er loksins fíggjarlógin endaliga er samtykt.

Í hesi endaligu samtyktini eru tveir batar, hvat samferðsluni til Sandoy viðvíkur.

Tað er vegurin á Gomlurætt, og vegurin niðan frá ferjuleguni í Skopun og sum bindur í Sandsvegin.

Tá ið eg var varugur við, at hetta ikki var á fíggjarlógini at byrja við, tá bóðu vit í kommunustýrinum í Skopun um fund, saman við Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum.

Hann skilti okkum ógvuliga væl, og bað hann landsverkfrøðingin um at gera eina kostnaðarmeting beinanvegin, og var tað gjørt.

Eisini hevði kommunustýrið fund við Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum, og greiddu vit honum frá støðuni.

Fíggjarnevndin var eisini eitt stað, sum var leitað til. Bæði meiriluti og minniluti í fíggjarnevndini vildu øll gera sítt besta.

So nú kann man gleðast um, at hesi arbeiðir verða gjørd í komandi ári, so langt tann játtaði peningurin røkkur,

Longu í røðini, ið eg helt, tá „Teistin" kom fyrstu ferð til Skopunar, segði eg, at tað næsta sum bleiv, um ikki so langa tíð, var undirsjóvartunnil til Sandoy. Kanska var tað sagt nakað í skemti.

Men veruleikin er nú tann, at allarhelst verður koyrandi til Sandoy innan 9 ár eru farin.

Tekniskt er eingin forðing. Møguliga kann peningur forða innan so stutta tíð.

Eg havi fleiri ferðir nevnt fast samband til Sandoy av tingsins røðarapalli, líkasum at venja tingmenn við tankan.

Tá kundi „Teistin" sum nýtt skip siglt ímillum Sand og Hvalba. Hetta er bara ein tanki, uttan at blanda meg í tað farleiðina, har eru so møguleikar. Tað nýggja Suðuroyarskipið, tað skal sjálvsagt sigla ímillum Tórshavn og Suðuroy.

Annars haldi eg, at Sandoy gongur eini ljósari tíð í møti.

Kommunurnar gera seg klárar í felag at taka í móti eldrarøktini, tær hava yvirtikið barnaansingina, og riggar tað væl.

Annars samstarva vit á nógvum økjum, og er tað neyðugt í eini lítlari oyggj sum Sandoy, og samstarvið riggar væl.

Eitt heilt annað mál sum eg vil taka fram er bergholið millum Húsavík og Dal. Hetta er so avgjørt tann so nógv hættisligasta farleiðin, ið vit hava í Føroyum. Hesin tunnilin má byrjast, ongantíð ov skjótt.

Hetta er eitt arbeiði, sum eg havi stríðst nógv fyri í tinginum.

Sjálvur settið eg broytingaruppskot fram ímillum 1. Og 2. viðgerð av fíggarlógini, um at seta pening av til fyrireikingar.

Sandoyggin er okkara eygnasteinur, og skulu vit í felag skapa tær bestu umstøður her í oynni. Her býr eitt virki fólk.

# Havnin og tey stóru skipini

**Jógvan Arge**
*Býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin*



Tað var áhuagvert at frætta, at okkurt tykist fara at koma burtur úr tingingunum millum vinnumálastýrið og Tórshavnar Kommunu um byggiætlanirnar á havnarlagnum í Havn.

Tingingarnar snúgva seg um tann partin av byggiætlanunum, sum tekniski serkunnleikin hjá landsstýrinum hevur kolldømt, tí hann heldur tær ikki vera nøktandi.

Hetta eru somu ætlanir, sum hava í sær hitt meir enn ivasama tilmælið um at sprongja framvið Tinganesi og hava fendarar at taka ímóti, um "Smyril" skuldi ætlað sær á land har.

Býráðið viðgjørdi fyri jól eina eykajáttan til havnarbyggingina, sum eg tók undir við. Hendan eykajáttan fevndi bert um tað arbeiðið, sum verður gjørt á eystursíðuni á Eystaru vág til tess at tryggja, at "Norrøna" kann avgreiðast, tá hon kemur um skamma stund..

Ætlanin var, at aðrir stovnar partvís skuldu gjalda saman við kommununi, men tað fekst ikki í lag, og tí mátti eykajáttanin til.

Eykajáttanin fevndi ikki um byggiætlanir, sum skala Tinganes og Skansan, men fornminnini bæði koma í skotmála, um farið verður víðari við teimum ætlanum, sum Tórshavnar Havn hevur í kvittanum.

Tá verður eftir øllum at døma neyðugt at skjóta undir Tinganesi fyri at fáa "Smyril" innímillum "Norrønu" og Tinganes, og tá hevur eisini verið nevnt, at neyðugt verður at snýsa av Skansanum fyri at fáa teir mongu bilarnar til og frá.

Hetta eru týðulig tekin um, at fóturin er ov stórur til skógvin.

Taki ikki undir við slíkum ætlanum. Havi eisini sagt tað hart og týðuliga á seinasta býráðsfundi og á nevndarfundi, har okkurt tílíkt varð borið upp á mál.

Tað má bera til at fáa skipini at bryggju uttan at kloyna tey upp at hvørjum øðrum í siglingarrennuni inn í bátahylin við Kongabrúnna.

Og tað er neyðugt í størsta álvara at seta út í kortið, hvar og hvussu havnarløgini í Tórshavnar Kommunu skula víðkast í framtíðini, tí hesi bæði ferðamannaskipini verða ikki einastu stóru skip, sum koma á Havnina í komandi tíðum.

Skal byggjast út á Skansabryggjuni, úti á Glyvursnesi, á Kaldbaksfirði ella á Kollafirði? Og hvat skal verða hvar?

Nógvir møguleikar eru at meta um, men vist er, at framtíðarmøguleikarnir hjá teimum stóru skipunum eru ikki inni í tronganum á Eystaru vág.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Bananrepublikk contra arbeiðstímar

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Havi við áhuga lisið viðmerkingar hjá formanninum í búskaparráðnum til stjóran í Fiskavirking um útboð og eftirspurning av tøkum arbeiðstímum í Føroyum, og haldi eg at tær eru áhugaverdar og eftir mínum tykki rættar, undiritaði er sum kunnugt ikki búskaparfrøðingur men politikari, so mínar viðmerkingar eru ikki grundaðar á búskapartekniskar metingar men skulu einans síggjast sum eitt uppískoyti til formannin í búskaparráðnum og til stjóran í Fiskavirking.

Tað er eftir mínum tykki nógv meira áhugavert at hyggja eftir virðisøking pr arbeiðstíma, enn eftir kostnaði pr arbeiðstíma, eftirsum tað í fyrsta umgangi ræður um at skapa so høgt virði sum tilber, pr arbeiddan tíma, hettar er nokk eisini grundin til ymiskar lønaskipanir eru frammi, eitt nú innan flakavinnuna (Akkordskipan).

So leingi sum vit sum nú, eru fangaðir í einari keðiligari ringrás av at hava met í at framleiða og útflyta rávøru og hálvlidna vøru, so hava arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar ongan annan møguleika at hála aftur og fram eftir ávíkavist lønarhækkingum og lønarlækkingum t.v.s arbeiðsløn pr tíma.

Hinvegin tosað vit lítið og einki um, hví tímalønin er relativt lág, og at skattatrýst og avgjaldstrýst hevur met, samanborið við Europa.

Vit kunnu staðfesta, at tey fyrstu uml 50.000 tonsini av rávøru sum fara beinleiðis av landinum ikki skapa meira arbeiðstímar enn at koyra fiskin umborð á fraktskip við keikant og so møguliga onkur skal blakað eitt sindur á ísið oman á fiskin.

Hinvegin er undiritaði greiðir yvir, at um prísurin fyri tann heila fiskin er nógv hægri enn vit klára at bjóða, so er tað best at hann fer heilur av landinum, men vit skulu nokk eisini skilja, at so hava vit í longdini ein nógv størri og álvarsligari trupuleika at dragast við.

Nú kunnu vit so hyggja eftir restini av okkara útflutningi og síggja eina stóra nøgd av hálvfabrikata uttan at fara í smálutir, kunnu vit síggja at Føroyar í dag eru vorðnar eitt bananveldi, hettar sigi eg, tí at vit sum kunnugt framleiða væl minni pr íbúgva, enn okkara grannalond, tað er nokk ikki so løgið, eftirsum rávøran ella »Fólksins ogn verður send til onnur lond at virðisøkja«.

So er spurningurin, hvussu vit skulu bera okkum at við at virðisøkja, soleiðis at fiskivinnan aftur verður før fyri at yvirbjóða arbeiðstímar mótvegis øðrum vinnum, her heima, og mótvegis londum sum vit kappast við.

Fyri at siga tað stutt.

Størri íløguhug og risikovilligan kapital innan framleiðslu á landi.

Betri sølir fyri føroyska framleiðslu.

Rættari og størri automatisering av framleiðslueindini.

Sleppa úr støðuni sum triðja land mótvegis ES.

Granskingarumhvørvi innan fiskivinnu við váðafúsum kapitali.

Hesi tiltøk vilja eftir mínum tykki lyfta Føroyar úr støðuni sum rávøruveitari, og hvar vit aftur av røttum kunnu siga, at vit ikki eru við fyri at læra, men vit eru við fyri at vinna, og at okkara arbeiðsgevarir og okkara verkafólk, skulu fáa væl meira burturúr hvørjum einkultum arbeiðstíma.

# Til Føroya

O, tíni reinu eygu ljós og blá
meg minna á tað dýpið sum eg sá -
(tað sjeyogtjúgá ár nú eru síðan').
Títt andlit er so yndisligt at sjá,
og røddirnar um tíðirnar sum tá
ið landsins vitni, umboð fóru víðan.

Barst fyri tínum góða, fagra hind,
og dálka ikki teg við teirri synd,
sum heimsins tjóðir tær nú vilja bjóða.
Tær ognið eg mítt ljóð, sum eymt eitt kind,
ið tváar sær í ljósins frísku lind
av inniligum evnum við tí góða.

Við heilsan eg nú endi hetta ljóð,
og biði um at eydnan er tær góð
um heimsins høv, har Kristus við tær fylgir.
Títt eyðkenni er himmal, hav og blóð,
og undir tí mangt Føroya barnið stóð,
um hóttu ódnarstormar, brutu bylgjur.

Allahalgannadag
01.11.02.
**Christian F. Djurhuus**

# Heimaútróðurin í trygga legu

**Gerhard Lognberg**
*løgtingsmaður*



Harmuligt er at síggja, at menn ikki sleppa til útróðar, grunda á, at fiskidagarnir eru uppi. Hetta er ein partur av smábátunum, sum avgjørt ikki eru teir sum tøma grunnarnar.

Okkara veðurlag ger, at teir hava stórar avmarkingar. Heldur ikki hava teir loyvi at fiska haldidagar, sum onnur skip kunnu. Annars er tað ikki tað, sum eg eri keddur um, at teir ikki kunnu fiska halgidagar, tí tað er í lagi eftir míni metan.

Vit eiga at fara inn og eftirhyggja hesa skipan, tí her er nógv sum haltar. Vit eru vitnir til, at ungir kemm koma til bygdar við nýggjum bátum, sum einki loyvi hava. Teir mugu út at leita eftir onkrum burturkasti, og keypa fyri okurspris – hetta er ikki rætt.

Verður hetta gongdin, so verður tað skjótt, at hetta við útróðrarmonnum á smáplássum verður søga. Nógv verður tosað um mentan. Eg haldi, at hetta er mentan, ongin ivi um tað.

Oyggjarnar verða fátækar, tá vit hava forkomið heimaútróðrinum, og haldi eg sjálvur, at vit eru væl áleiðis.

Eg kann nevna sum dømi, at síðsta ár var tað so, at dagarnir vóru uppi hjá bólki 5 B. Men var tað skjótt, at tað kom aftur í rættlag. Har var ein maður í Skúvoy, sum akkurát hevði gjørt bátin kláran, men kundi ikki fiska, grundað á, at dagarnir vóru uppi, hóast hann ongan túr hevði verið.

Bátar undir 10 tons eiga at kunna fiska frítt, tí tað ikki eru teir, sum oyða grunnarnar.

Annars skilti eg á Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, at hann fór at royna at loysa hendan trupulleika beint eftir nýggjár.

Nei, latið okkum sum eru valdir av fólkinum, taka hendur saman og fáa heimaútróðurin í trygga legu. Tað gera vit bert við at siga heilt einkult, at bátarnir fiska frítt, alt annað er at reingja veruleikan, tí hetta er ikki tann parturin, sum er hóttanin fyri grunnarnar.

# Svikna barnið

Ber tú ta sorg hjartað má tola
Vinur eg gráti við tær
Troyttur og svikin í verð
Forlorið tað gullið heimur ber
Næstin royndist svíkjarin ein.

Maður kvinna heimið kæra
Svárt gráta bangin barnaeygu
Tá svíkur svárt man herja
Faðir móðir barnaheimið syndra
Slitin kærleiksbond eym.

Hatur veksur fram um kærleik
Sum eitur sterka roynist tá
Barnasálin viðbrekin reikar
Eingin friður eingin skái
Kærleikseldur køvdur er.

Maður kvinna gróðrarurtin sterka
tit ið seta lív í jarðar verð
Minnist til tað lítla fræið
Lívgið um verjið væl tað lítla
Tykkar egna reina hjartablóð.

**EKN, Rituvík**

# Framhald av fløskuinnsavnan

**FLØSKUINNSAVNAN**
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 11. januar fer Tensing kórið, Sound of Glory í KFUM & K í Havn, aftur undir at savna fløskur.Eftirsum at kórið ikki náddi alla Havnina seinasta leygardag, fara tey at gera arbeiði liðugt nú leygardagin. Farið verður í tey húsarhald ið eftir eru, seinnapartin leygardag. Um tað skuldi hent at onkur var gloymdur ella hevur eyka fløskur, ber til at ringja á tlf 262404 leygardagin, og fáa eina avtalu í lag.

